Neistin-H71 24-28 (8-18):

Sensatión í Havn

Neistin hevur higartil verið mest óvæntaða oddaliðið í bestu mansdeildini, men sunnudagin skutu teir sjálvar so dyggiliga í fótin, tá hoyvíkingar høvdu vent vápnini ímóti Neistanum

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Líka mikið hvussu Neistin royndi at toga seg aftur í dystin, so høvdu teir alla tíðina trupult við at fáa bóltin seinasta pettið inn um Levi Nybo í hoyvíksmálinum

Tað var einki at ivast í, at Neistin vóru favorittar at vinna grannauppgerðina móti hoyvíkingum sunnudagin. Alt árið hava liðini strítt hvør sítt stríð, har Neistin við hepnari hond hevur hingið fast í oddinum, meðan H71 hinvegin hevur stríðst fyri at sleppa av avgjørda botnsessinum. Eitt stríð sum higartil ikki hevur hepnast so væl, men sunnudagin tóku teir so eitt risafet rætta vegin, um enn talan var um eitt óvæntað fet.

Tað var nevnliga skjótt greitt, at hóast favorittleiklutin hjá Neistanum, so høvdu hoyvíkingarnir als ongan hug bara at leggja seg niður, soleiðis uttan víðari.

Frá fyrsta sýndu gestirnir hinvegin, at teir so avgjørt ætlaðu sær at hava eitt orð at siga. Uttan stóvegis himpr royndu teir alt fyri at leggja tryst á Neistan, og hetta tóktist í øllum førum vera væl meira, enn Neistin hevði roknað við. Í øllum førum vóru teir bláu tiknir fullkomuliga á bóli av ógvusligu byrjanini, og áðrenn nakran vardi, hevði H71 vunnið sær eina hampuliga stóra leiðslu.

Einki mótvápn

Og Neistin hevði í verulegum mun tikið hendurnar av leikanum einki mótvápn móti hoyvíkingunum. Fá høvdu kanska mett undan kappingarárinum, at Neistin skuldi gera seg galdandi í oddinum, men við einføldum loysnum hava teir kortini megnað hetta. Uppskriftin hevur fyrst og fremst verið stríðsvilji og samanhald, men hetta vendu hovyíkingarnir so beint ímóti teimum nú.

Við eini væl virkandi verju, har hvør einasti leikara offraði seg, tóku teir væl ímóti tí, sum kom, og sluppu mótstøðumenninir loksins innum, hevði H71 í Levi Nybo ein sera tryggan aftasta skansa. Ein skansa, sum annars skifti til H71, tá spælitíðin í Neistanum tóktist verða millum lítil og eingin.

Í hinum endanum tóktust hovyíkingarnir heldur ikki hava stórvegis virðing fyri annars væl vaksnu neistaverjuni. Í Halgir Dahl Olsen hevur liðið í fleiri ár havt ein hin besta skjúttan í landinum, men trupulleikin er ofta, at hann einsamallur skal bera mest sum alla ábyrgdina á liðnum. Hesa ferð komu tó fleiri av liðfelagunum við, soleiðis at tað ikki var nóg mikið hjá Neistanum bert at hugsa um ein leikara, og tað gav so aftur betri pláss til Halgir, sum ferð eftir ferð høgdi bóltarnar inn í meskarnar.

Royndin miseydnaðist

Við tíggju málum á muni í steðginum, var ikki annað væntandi, enn at seinni hálvleikur skuldi vera eitt satt raid oman á hovyíksmálið, og partvíst varð hetta eisini sannleikin.

Hoyvíkingar hugsaðu nú kanska eisini meira um halda fast, heldur enn at økja um leiðsluna, og sálarliga trýstið, sum hetta viðførir, byrjaði spakuliga at merkjast. Eitt fyri og annað eftir minkaði máltalið, sum lá ímillum liðini, og onkur av hoyvíkingunum mundi so smátt fara at óttast eini endurtøku av merkisverda tapinum fyri KÍF undan vetrarsteðginum.

Eitt skifti miðskeiðis í hálvleikinum fekk Neistin átta mál á rað, og við átta minuttunum var nú ein verulig vón hjá teimum bláu. Stóra takið kostaði tó nógvar kreftir, og tá hoyvíkingar so loksins svaraðu aftur, varð hetta gjørt við manér. Hóast mansverju av Halgir, so fekk H71 trý mál á rað, og so var alt avgjørt.

Søtur sigur

Fyri hoyvíkingar mundi sigurin fyrst og fremst vera staðfestingin av tveimum kærkomnum situm, men tað kann tó væl vísa seg, at hetta eisini var so nógv meira enn tað.

Fyrst og fremst sálarligi týdningurin av, at leikararnir við hesum merktu, at tað væl kann løna seg at royna, hóast mótstøðan á pappírinum er sterk. Her hava hoyvíkingar í ár havt fleiri tættar dystir, men mest sum hvørja ferð er tað kortini endað við sigri til mótstøðuna. Sálarliga kann tað vera ein herskin biti at gloypa, tá leikararnir fáa kensluna av, at tað ongan tíð skal eydnast. Men hesa ferð eydnaðist tað, og fyri viðari lagnuna hjá hoyvíkingum kann hetta fáa alstóran týdning.

Fyri Neistan mundi tapið hinvegin kennast sum ein ordiligur frammaná. Hinvegin var hetta kanska eisini ein staðfesting av, at liðið ikki er nóg sterkt til ein oddasess. Í grundspælinum kundu teir við stríðsvilja sínum ferð eftir ferð loypa hvøkk á mótstøðuna, sum ikki hevði roknað við nøkrum frá teirra síðu í ár, men nú skuldu teir bráðliga royna seg sum favorittar, og kanska var tað meira enn nakað hetta, sum kostaði stigini. Tvey stig, sum kunnu vísa seg at gerast sera dýr fyri teirra viðkomandi.

Dysturin í tølum:

Neistin-H71 24-28 (8-18)
Málskjúttar:
Neistin: Morgan Knezevic 6(2), Helgi Justinussen 6, John Petersen 4, Dann Thorleifsson 3, Ragnar Stakksund 1, Kári Mortensen 1, Jón Ludvig 1, Helgi Michelsen 1
H71: Halgir Dahl Olesen 9, Niels Viggo Niclasen 5, Johnny Durhuus 4, Kristian Eli Zachariasen 4, Annfinnur N. Debes 3, Hans J. Jacobsen 2(1), Uni Wardum 1
Brotskøst: Neistin 2, H71 2
Útvísingar: Neistin 3, H71

Tjaldur-Stjørnan 17-20 (9-13):

Stjørnan heldur kósini

Við sigrinum á Tjaldri helt Stjørnan fast um triðja plássið, har tær framvegis ikki eru heilt afturúrsigldar av VB og VÍF

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Stjørnan vitjaði sunnudagin í Runavík, har tann á pappírinum lættasti útidysturin á árinum stóð fyri framman. Tjaldur hevur í alt ár hildið til niðast á stigatalvuni, og tó at tær gjørdu ein vørr herfyri móti einum kreppurakturm neistaliðið, so var ikki væntandi, at tær fóru at gera stórvegis við Stjørnuna, sum higartil hevur krøkt seg rættiliga fast at oddaliðunum.

Fylgdu væl við

Tað kundi tó verið okkurt sum bendir á, at Tjaldur nú hevur fingið betri treysti at gera seg galdandi í bestu deildini. Í øllum førum tóktust tær so avgjørt ikki hava nakrar ætlanir um at lata gestirnar sleppa uttan víðari, nú Stjørnan var komin á vitjan.

Tvørtur ímóti tóktist tað eina løtu soleiðis, at tað var Tjaldur, sum var omaná. Við at ansa leikandi venjaranum hjá Stjørnuni væl, soleiðis at hon ikki kundi gera alt ov nógv um seg, fekk Tjaldur partvíst steðga vandamesta vápninum hjá Stjørnuni, og tá tað so samstundis lá ræði fyri hjá teimum báðum útlendsku á tjaldursliðnum, var leingi líkt til, at talan skuldi gerast um ein heilt spennandi dyst.

Seinastu løtuna undan steðginum eydnaðist tó Stjørnuni at skræða seg leysa, men hóast hetta, so slepti Tjaldur ongan tíð heilt. Heldur royndu tær av øllum alvi at vinna tað mista innaftur eftir steðgin, men hetta eydnaðist tó ongantíð. Eitt skifti hótti Stjørnan eisini við at økja enn meira um leiðsluna, men tað bleiv so ongan tíð til meira enn tað sama, soleiðis at Stjørnan við einum sigri kundi taka enn fastari um triðja plássið á stigatalvuni, har tær framvegis bert eru trý stig aftan fyri VB og VÍF.

Tjaldur er hinvegin framvegis á aftasta plássinum í deildini, men hóast hetta, so er tað ivaleyst ein uggi hjá liðnum, at tær soleiðis alla tíðina kundu fylgja einum av fremru liðunum. Stig kastaði tað tó ikki av sær í hesum umfarinum, men verður hugburðurin eisini hin sami framyvir, er ikki óhugsandi, at hesi fara at koma. Fyrstkomandi tykist tó í løtuni at vera nakað burturi. Tjaldur hevur nevnliga frí komandi vikuskifti, og eftir steypafinaluna verður tað VÍF, sum kemur á vitjan.

Dysturin í tølum:

Tjaldur-Stjørnan 17-20 (9-13)
Málskjúttar:
Tjaldur: Lenka Ribaric 7(3), Melica 6 (1), Ann Mari Østerø 3, Sonja Gleðisheygg 1
Stjørnan: Natasha Stamenkovic 9, Danijela Ercevic 6(2), Bára S. Klakstein 2, Una Olsen 2, Ragna Andreasen 1
Brotskøst: Tjaldur 5, Stjørnan 2
Útvísingar: Tjaldur 3, **Stjørnan 1**
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johnansen & Sámal Hansen.

Fimm lið stríðast um FM-heitið

Báðir toppdystirnir í 1. deild endaðu við javnleiki, meðan kollfirðingar gjørdu ein vørr og eru nú á 2. plássi, aftanfyri havnarmenn

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Sjáldsamt er at heili fimm lið stríðast um FM-heitið, men í ár er hetta veruleikin í fremstu deildini í Føroyum. Føroyameistarnir í fjør úr Vestmanna flyta allarhelst niður í 2. deild. Havnarmenn, hvalvíkingar, klaksvíkingar og toftamenn hava alla kappingina verið staddir í toppinum, men eftir at kollfirðingar vunnu stórsigur á einasta botnliðnum í deildini, eru teir nú eisini við í oddastríðnum, enntá sum nummar tvey. Bert eitt stig skilur oddaliðið úr Havnini við nummar fimm! Sí støðuna, sum er í blaðnum í dag.

Kollfirðingar høvdu fingið sær almiklan styrk til dystin móti vestmenningum. Svenski stórmeistarin Tiger Hillarp Persson var aftur at síggja á kollfjarðaliðnum, og hetta skuldi vísa seg at verða sera avgerandi. Tiger vann á IM John Rødgaard, og hinir á liðnum vunnu somuleiðis favoritsigrar. 4-0 og kappingin er nú meira opin enn nakrantíð. Vestmenningar eru nú 7,5 stig frá bjargingini, og tað er ivaleyst ov stórur biti hjá teimum. Spell fyri vestmenningar, at tað varð júst móti teimum at KT valdi at styrkja um liðið.

Javnleikur hjá Havnini

Martin Poulsen var heldur ikki hesu ferð á havnarliðnum sum hitti hvalvíkingar, og tí mátti Olaf Berg traðka í hansara stað. Olaf gjørdi bart og vann á Martin Brekká. Hinvegin megnaði Herluf Hansen ikki uppgávuna á 2. borði móti Finnbjørn Zachariassen.

Haldur Suni Johansen var ikki aktivur seinasta ár, men hevur verður trúgvur í ár. Hann hevur vunnið øll síni fýra talv, sum hann hevur leikt fyri havnaliðið. Í vikuskiftinum vann hann á Sámal Christiansen, men Gunnar Joensen balanseraði dystin við sínum sigri á fjórða borði á Johan E. Hansen.

Havnarmenn vildu helst meir enn 2-2, men hvalvíkingar hava altíð verið drúgvir, og hugsa vit um at Martin Poulsen væntaði á liðnum, eru teir úr Havnini hóast alt kanska nøgdir við úrslitið.

Bogi feldur – Jens Kristian ikki at steðga

Toftamenn hava í ár blandað seg í oddastríðið, og tað kunna teir takka Boga Ziska og Jens Kristian Hansen fyri. Serliga hesin seinasti hevur verið álitið við nú seks sigrum á rað á øðrum borði. Jens Kristian vann fyri aðru ferð í liðkappingini á Rana Nolsøe.

Bogi hevði undan sætta umfari ikki tapt, men Ólavur Simonsen broytti uppá hetta tá hann vann uppgerðina á fyrsta borði. Finnbjørn Vang úr Klaksvík tapti óvæntað móti Wenzil Højgaard. Tummas M. Anthoniussen vann á fjórða borði, og úrslitið gjørdist tí javnleikur 2-2.

Tá rating viðvíkur eru klaksvíkingar nógv sterkari enn toftamenn, og eru klaksvíkingar tí helst skuffaðir av úrslitinum. Toftamenn hava tó víst seg at vera sera støðugir, og við forminum hjá Jens Kristian í huga kunna teir røkka langt í ár.

Toppskorarar í 1. deild:

Jens Kristian Hansen	6/6!
Haldur S. Johansen	4/4
Ólavur Simonsen	4/6
Hans K. Simonsen	4/6
Herluf Hansen	4/6
Tummas M. Athoniussen	4/6

2. deild

Sandavágsmenn stríddu seg framum runvíkingar í sætta umfarinum. Torkil & co vunnu stórsigur á vestmenningar, 3,5-0,5, meðan runavíkingar og klaksvíkingar leiktu 2-2. Triði dysturin í deildini varð millum HT 2 og HT 3, sum HT 2 vann 3-1.

Veteranurin Jákup Thomsen, sum eftir nógv ár í talvdvala, hevur verið álitið á HT 3. Jákup hevur ognað liðnum 4,5 stig av 5 møguligum. Aðrir stigslúkarar í deildini eru Ingolf Gaard úr Klaksvík (4/4), Torkil Nielsen úr Sandavági (4,5/6), Jógvan Næs (4/6) og Bjarki Ziska (3,5/4) úr Runavíkar Talvfelag.

Sandavágsmenn eru eitt stig fremstir, meðan klaksvíkingar enn eru hálvtfjórða stig aftanfyri runavíkingar.

Anand vann í Wijk aan Zee

Fýra vunnin talv og heili níggju javnleikir, men hinvegin einki tap, varð úrslitið hjá indaranum Viswanathan Anand, sum vann krútsterku stórmeistarakappingina í Wijk aan Zee, Hollandi. Anand vísti sítt virði og vann uppiborið. Í hølunum á honum, við somuleiðis ongum tapi kom óvæntað ungarska Judit Polgar. Hon fylgdi væl við Anand alla kappingina, og var eitt nú um reppið at vinna á just Anand í næstseinasta umfarinum. Ein mergjað kapping av Polgar, sum nú kanska hevur førkað seg innum topp 10 í heiminum.

Russin Evgeny Bareev, sum vann í fjør, bleiv tann triði í røðini, meðan heili fimm telvarar býttu fjórða plássið, harav Vladimir Kramnik, sum ikki hevði eina nevnuverda kapping um vit hava status og ratingtal hansara í huga. Anatoly Karpov royndi seg aftur millum ungu stjørnurnar, og varð úrtøkan hjá gamla meistaranum á gongdari leið, sum nú kortini ikki rættiliga meir kann blanda seg í absolutta toppin. Men bíta frá sær, kann hann tó av og á.

Unglingarnir Grischuk, Ponomariov og Radjabov, sum allir hava verið í Føroyum í talvørindum, vóru eisini millum luttakararnar. Minni væl gekst hjá Ponomariov.

Endaliga støðan:

Anand	8,5 av 13
Polgar	8,0
Bareev	7,5
Shirov	7,0
Van Wely	7,0
Grischuk	7,0
Ivanchuk	7,0
Kramnik	7,0
Radjabov	6,5
Topalov	6,5
Karpov	6,0
Ponomariov	6,0
Krasenkow	4,5
Timman	2,5

1. deild 6. umfar

Heima	Úti	Stig
HT	TFS	2-2
Olaf Berg	Martin Brekká	1-0
Herluf Hansen	Finnbjørn Zachariassen	0-1
Haldur Suni Johansen	Sámal Christiansen	1-0
Johan E. Hansen	Gunnar Joensen	0-1
VT	KT	0-4
John Rødgaard	Tiger Hillarp-Persson	0-1
John Jacobsen	Hans Kristian Simonsen	0-1
Dánjal Petur Højgaard	Torbjørn Thomsen	0-1
Jákup á R. Andreasen	Eyðálvur Johannesen	0-1
TT	KTF	2-2
Bogi Ziska	Ólavur Simonsen	0-1
Jens Christian Hansen	Rani Nolsøe	1-0
Wensil Højgaard	Finnbjørn Vang	1-0
Helgi Joensen	Tummas M. Anthoniussen	0-1

Støðan í 1. deild

Lið	Stig
1. HT	14,0
2. KT	13,5
3. TFS	13,0
4. KTF	13,0
5. TT	13,0
6. VT	5,5

Støðan í 2. deild

Lið	Stig
1. ST	16,5
2. RT	15,5
3. KTF 2	12,0
4. HT 2	10,0
5. VT 2	9,0
6. HT 3	9

Talvið hesa vikuna

HT Open verður leikt í hesum døgum í hølum Havnar Telvingarfelags. Fyrstu trý umførini vórðu leikt týsdagin, mikudagin og hósdagin, og soleiðis verður skráin eisini hesa og komandi viku. Havnar Telvingarfelag verður 80 ár í apríl, og tí verður nógv gjørt burturúr hesum talvári í Havn, við eitt nú FM fyri einstaklingar á páskum, og hesari kapping. Trý umfør eru sum sagt leikt, og favorittarnir flestir hava longu yvirtikið toppin.

Olaf Berg og Hans Kristian Simonsen hava fult stigatal, meðan fyrrverandi føroyameistarin Súni Ziska hevur hálvtriðja stig. Seks telvarar hava tvey stig, eitt nú Ólavur Simonsen og Andrias Ziska. Ólavur tapti fyrsta umfar móti Hans Kristiani, men reisti seg í øðrum umfari móti Brandur Jacobsen.

Ólavur Simonsen — Brandur Jacobsen
HT-Open 2003 (3), 22.01.2003

Viðmerkingar: Ólavur Simonsen og Carl Eli N. Samuelsen

1.e4 e5 2.Rif3 Rif6 3.d4 Rixe4 4.dxe5 d5 5.Ribd2 Ric5 6.Rib3 Rie6 7.c3 Be7 8.Bd3 c5 9.Bc2 Ric6 10.0—0 Ric7 11.Re1 Be6 12.Ribd2 Fd7 13.Rif1 h6 14.a3 0—0—0 (hvítur hevur kanska lítlan fyrimun, men svartur hevur leikt sunt í byrjanarspælinum og stendur aktivt nokk) 15.Rb1 d4! (góður avviklingsleikur) 16.cxd4 Rixd4 17.Rixd4 Fxd4 18.Fxd4 Rxd4 19.Be3 Rdd8 [19...Rd7 helst petti betri er at dobla rókarnar] 20.f4 g6 21.Bf2 Rid5 22.g3 h5 23.Rbc1 Kb8 24.Be4 Rc8 25.Rid2 Rib6 26.Re2 Rhd8 27.Kg2 Rc7 28.Bf3 Rd3 29.h3 Ria4 30.Be4 Rd8 31.b3 [31.Nc4! gevur hvítum góðan fyrimun] 31...Rib6 32.Ric4 Rid5 33.a4 h4 34.Bf3 hxg3 35.Bxg3 Rib4 36.Rid6 (sambart telduforritinum Fritz 7 hevur svartur onkra verju her, men tá Brandur bert hevdi 3 min. eftir til leik 40, og sidan 15 min. til restina av talvinum, er hesin spæliháttur hin rætti) 36...Rh8 [36...Bxb3 37.Rib5 er áhugavert] 37.Bg4 Bd5+ 38.Kh2 f5! 39.exf6 (Ólavur offrar. Hann satsar, eftirsum at passivt spæl hevði tapt í longdini) 39...Bxd6 40.Rd2 Bf8? [40...Rf8! eigur at vinna.] 41.Rxd5! Rixd5 42.Rd1 Rib6 [42...Bd6 43.Rxd5 Rd8 44.Be6 Rh7 45.Rxd6 Rxd6 46.f5 Kc7 47.fxg6 og hvítur vinnur] 43.Rd8+ Ric8 44.Be6 Bg7 45.fxg7 [45.Rxc8+! Rhxc8 46.fxg7 Rxg7 47.f5+ Rcc7 48.f6 Rh7 49.f7 Rh8 50.Bd6 vinnur fyri hvítan] 45...Rxd8 46.f5 gxf5 47.h4 Rie7 48.h5 b6? (skiljandi er at hann finna rætta leikin í hesari sera kompliseraðu støðu. Rd2+ var seinasti møguleiki, sum eisini átti at forða fyri tapi hjá svørtum. [48...Rd2+ 49.Kg1 Rd3 (49...Rd1+ 50.Kf2 Rh1 (50...Rd2+ 51.Ke1 Rg2 52.h6 Rxg3 53.h7 Rxg7 54.h8F+ Rig8 hóttir Bf7+ 55.Bxg8) 51.Bd6 Rxh5 52.Bxe7 hvítur verjir g5 so svartur ikki kann steðga finnuni.) 50.Bf4 Rh3 51.h6 b6 52.Kg2 Rxh6 53.Bxh6 Rc6 54.Bf4+ Kb7 55.Bf7 Rf6 56.Bh5 og støðan er enn óklár] 49.h6 Rig6 DIAGRAM 50.Bxc7+ Kxc7 51.h7 flott endastøða. Ólavur satsaði tá hann stóð kroystur, og tað loysti seg. 1—0

Diagram eftir 49....Rig6 hjá svørtum